# Haruveiðan í Føroyum í 2012

*Eyðfinn Magnussen, biologur, Fróðskaparsetur Føroya*

***Í 2012 vórðu einar 7.000 harur skotnar í Føroyum. Hetta vísir ein kanning, sum varð gjørd av haruveiðuni í Føroyum í 2012. Kanningin vísir eisini, at sørvingar í Norðara parti av Norðurtriðingi vóru teir, ið skutu tær flest harurnar. Tað varð eisini staðfest, at Streymoyggin er tann oyggin, har flestu harurnar vórðu skotnar, at Vestmanna var ársins harubygd og at meginparturin av harunum verða skotnar leygardagar***

Hetta var fyrsta roynd at gera eitt yvirlit yvir, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum. Í Føroyum er nógvastaðni stórur áhugi fyri haruskjóting og hvussu nógvar harur verða skotnar í harutíðini, sum er frá 2. november til 31. desember. Hóast hetta, finst einki samlað yvirlit um, hvussu nógvar harur tilsamans verða skotnar kring landið. Onkrir eru, sum skrivar niður, hvussu nógv verður skotið í haganum, har teir sjálvir skjóta, men tað fanst einki samlað yvirlit fyri allar Føroyar.

Men nú frágreiðingin 'Haruveiðan í Føroyum 2012' er komin, vita vit meira. Frágreiðingin er 44 blaðsíður og lýsir, hvussu haruveiðan hilnaðist ymsastaðni í Føroyum í 2012. Veiðan verður samanborin millum: hagapartar, oyggjar og bygdir, og hugt verður eftir, hvussu nógv varð skotið fyrsta og síðsta dag og teir ymisku leygardagarnar í harutíðini. Eisini er ein kapittul við søguligum veiðutølum við í frágreiðingini.

Hetta var fyrsta roynd at kanna, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum. Ætlanin er at endurtak hesa uppteljingina komandi ár, og vónandi verður yvirlitið fyri haruveiðina fyri 2013 enn meira fullfíggjað.

## FØROYSKI HARUSTOVNURIN

Í frágreiðingini eru eru tilsamans 5.381 harur skrásettar at vera skotnar í Føroyum í 2012. Men yvirlitið er tíðanverri ikki fullfíggjað, so helst er samlaða talið av harum, sum vórðu skotnar í

| | Hagapartur | Bygd | Skotnar harur tilsamans | Tal av túrum |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Norðurtriðingur, Norðari partur | Sørvágur | 120 | 10 |
| 2. | Skálatoftir | Skálatoftir | 116 | 8 |
| 3. | Dúvugarðar | Saksun | 110 | 8 |
| 4. | Presthagi, Heimara gonga | Kvívík | 105 | 14 |
| 5. | Uttan Hús á Fjøllum | Miðvágur | 101 | ikki uppgivið |
| 6. | Fyri Norðan | Kunoy | 96 | 7 |
| 7. | Sjeyndir | Tjørnuvík | 91 | 8 |
| 8. | Fyri Norðan Á | Eiði | 90 | ikki uppgivið |
| 9. | Dalar, Eystanfyri | Vestmanna | 88 | 3 |
| 10. | Fyri Innan | Skarð | 87 | 4 |
| 11. | Úti í Haga á Bjørgum | Vestmanna | 85 | 5 |
| 12. | Leynahagi, Uttan fyri Húsini | Leynar | 83 | 6 |
| 13. | Skarðhamar | Hvannasund | 71 | 3 |
| 14. | Bergsmunnin | Viðareiði | 70 | 8 |
| 15. | Kirkjubøhagi, Fyri Heiman | Kirkjubøur | 62 | 3 |
| 16. | Botnar | Funningur | 62 | 11 |
| 17. | Syðradalshagi | Syðradalur S | 60 | 3 |
| 18. | Sjóvarhagi, Fremri partur | Kollafjørður | 58 | 10 |
| 19. | Norðan Á | Haldarsvík | 58 | 11 |
| 20. | Úti í Haga | Norðadalur | 58 | 6 |
| **Tilsaman** | | | **1.671** | **128** |

***Talva 1:*** *Teir 20 hagapartarnir í Føroyum, har flestar harur vórðu skotnar í 2012. Eisini sæst, hvussu nógvir túrar vórðu gjørdir í hesum hagapørtunum. Tær 1.671 harurnar, sum tilsamans vórðu skotnar í hesum 20 hagapørtunum, svarar til 31% av samlaða talinum av harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2012.*

Føroyum í 2012 omanfyri 7.000. Siga vit, at helvtin av harunum í stovninum verða skotnar á hvørjum ári, so var samlaði føroyski harustovnurin í 2012 umleið 14.000 harur. Nú var 2012 eitt serstaka vánaligt ár til haru. Flestu harumenn, sum eg havi tosað við siga, at teir bara hava fingið umleið helvtina av tí, sum teir vanliga plaga at fáa. Er hetta rætt, verða eitt miðal ár skotnar dupult so nógvar harur í Føroyum, t.e.14.000, og so er føroyski harustovnurin eisini tað dupulta, t.e. 28.000 harur.

## SØRVINGAR RASKASTIR

Kanningin vísir, at raskastir at skjóta harur í 2012 vóru teir í hagapartinum Norðurtriðingur, Norðari partur í Sørvági. Teir fingu tilsamans 120 harur á 10 túrum. Teimum á baki komu teir á Skálatoftum á Borðoynni við 116 harum, sum teir fingu á 8 túrum. Á triðja plássi vóru teir í Dúvugørðum í Saksun við 110 harum, eisini á 8 túrum. Kanningin vísir, at í 20 teimum bestu haruhagunum í Føroyum vórðu skotnar tilsaman 1.671 harur, sum er 31% av samlaðu veiðuni í 2012 (Talva 1).

## FLESTU SKOTNAR Í STREYMOYNNI

Kanningin vísir eisini, at í 2012 vórðu flest harurnar skotnar í Streymoynni, tilsamans 2.511, sum er 47% av samlaða talinum av harum, sum vórðu skotnar í Føroyum. Í Vágum vórðu skotnar 948




***Mynd 1:*** *Tal av harum, sum vórðu skotnar á hvørjari oyggj í 2012 og samlaða talið av harutúrum, sum vórðu gjørdir*

harur, í Eysturoynni 567 og á Borðoynni 447 harur (Mynd 1). Tað var eisini á Streymoynni, at flestu túrarnir vórðu gjørdir. Tilsamans 293 harutúrar eru skrásettir í 73 av teimum 82 hagapørtunum, sum eru í Steymoynni. Í Eysturoynni gjørdu teir 103 túrar og í Vágunum 93 túrar, har teir tilsamans fingu 948 harur.

## VESTMANNA ÁRSINS HARUBYGD

Vestmanna er tann bygdin í Føroyum, har flestu harurnar vórðu skotnar í 2012 (Mynd 2). Tilsamans skutu vestmenningar 429 harur á teimum 31 túrunum, sum teir gjørdu í teimum 10 haruhagunum, sum hoyra til bygdina. Í Sandavági fingu teir 320 harur á 45 túrum og í Sørvági 292 harur á 36 túrum.




***Mynd 2:*** *Talið av harum, sum vórðu skotnar í tíggju teimum bestu bygdunum í Føroyum í 2012, og talið av harutúrum, sum vórðu gjørdir í hesum bygdunum*

## LEYGARDAGSSKJÓTING

Hóast tað í Føroyum er loyvt at skjóta haru einar 50 dagar um árið, so verður tó mest skotið leygardagar. Á mynd 3 er víst hvussu skjótingin hilnaðist 11 ávísar dagar í veiðitíðuni í 2012.

Fyrsta leygardag vórðu skotnar tilsaman 831 harur í 61 høgum kring landið. Hetta er 19% av samlaðu haruveiðini, og 11% av túratalinum. Seinasta dag vórðu skotnar tilsamans 628 harur í 95 høgum.







***Mynd 3:*** *Tal av harum, sum vórðu skotnar 11 ávísar dagar í 2012. Niðast sæst í hvussu nógvum hagapartum, skotið varð hesar dagarnar. Talan er um fyrsta harudag (2. november), 8 fylgjandi leygardagar, triðja jóladag og so seinasta dag, loyvt er at skjóta haru (31. desember).*

## FACEBOOK HØVUÐSKELDAN

Kanningin byggir á úrslit frá 649 einstøkum harutúrum, sum vórðu gjørdir í 199 ymiskum hagapørtum í 68 bygdum í Føroyum. Upplýsingarnir eru fingnir til vega frá tilsamans 183 ymiskum heimildarfólkum kring landið.

Innsavningin av veiðitølunum í frágreiðingini byggir á upplýsingar, sum eru fingnir frá harumonnum kring landið. Innsavningin av veiðitølum er í størstan mun farin fram við Facebook-bólkinum "Haruskjóting í Føroyum". Hetta er ein afturlatin facebook-bólkur, sum tú kanst gerast partur av, við at søkja um tað, ella tú kanst verða lagdur aftur at bólkinum av einum av teimum, sum longu eru við. Eftir at veiðitíðin var liðug, var eisini ringt til bøndur og harumenn, sum eg var vitandi um, ella hevði frætt um, høvdu skotið harur í 2012.

## ENDURTAKA TALJINGINI Í 2013

Í kanningini havi eg ikki fingið fatur á øllum tølunum, um hvussu nógvar harur vórðu skotnar í Føroyum í 2012. Spurningur er so, hvussu stórum parti av veiðitølunum, sum tað er eydnast mær at fáa fatur á?

Í Føroyum eru tilsamans 472 hagapartar (Talva 2). Í kanningini eru harutøl fingin til vega fyri tilsamans 199 hagapartar, sum svarar til 42 % av øllum høgunum í Føroyum. Streymoyggin

| Oyggj | Tal av markatals-bygum | Tal av hagum pr. oyggj | Tal av hagum við haru-tølum | % |
|---|---|---|---|---|
| Fugloy | 2 | 10 | 0 | 0 |
| Svínoy | 1 | 8 | 2 | 20 |
| Viðoy | 2 | 14 | 10 | 71 |
| Borðoy | 8 | 26 | 19 | 73 |
| Kunoy | 3 | 10 | 5 | 50 |
| Kalsoy | 4 | 21 | 8 | 38 |
| Eysturoy | 20 | 114 | 26 | 23 |
| Streymoy | 19 | 82 | 73 | 89 |
| Vágar | 5 | 40 | 26 | 65 |
| Mykines | 1 | 5 | 0 | 0 |
| Koltur | 1 | 1 | 0 | 0 |
| Hestur | 1 | 3 | Øll oyggin | - |
| Nólsoy | 1 | 3 | Øll oyggin | - |
| Sandoy | 5 | 42 | 6 | 14 |
| Skúvoy | 1 | 5 | 1 | 20 |
| Stóra Dímun | 1 | 1 | 0 | - |
| Lítla Dímun | 0 | 1 | 0 | - |
| Suðuroy | 10 | 86 | 21 | 24 |
| **Samlað** | **85** | **472** | **199** | **42** |

***Talva 2:*** *Tal av markatalsbygdum á hvørjari oyggj og talið av hagapørtum, sum hoyra til bygdirnar. Høgrumegin sæst talið av hagapørtum, sum eru við í uppteljingini av haruveiðini í Føroyum í 2012, og hvussu stóran prosentpart hetta svarar til, í mun til talið av høgum, sum eru í oynni. Markatalsbygdir eru bygdir, ið nevndar eru í elstu jarðarbókum.*



er tann parturin av landinum, sum er best umboðaður í kanningini. Har eru harutøl fingin til vega fyri 73 av teimum 82 hagapørtunum, sum eru í oynni. Hetta svarar til 89%. Næst kemur Borðoyggin (73%) og so Viðoyggin (71%). Eysturoyggin er tann parturin av landinum, sum er ringast umboðaður í kanningini. Tað hevur bert eydnast mær at fingið fatur á harutølum frá 26 av teimum 114 høgunum, sum eru í Eysturoynni. Tað svarar til 23 % av hagunum í oynni.

Ætlanin er sum sagt, at endurtaka teljingina komandi ár, so standa vit tá saman, kann úrslitið gerast upp aftur betur í 2013.

**FRÁGREIÐINGIN TØK Á NETINUM**

Hetta er ein stuttur samandráttur av tí, sum kann lesast í frágreiðingini. Tey sum vilja vita meira um haruveiðuna í Føroyum í 2012, kunna lesa alla alla frágreiðingina 'Haruveiðan í Føroyum 2012', sum er til taks á netinum, sum pdf-skjal:

http://www.setur.fo/fileadmin/user_upload/NVD/EydfinnM/Harut%C3%B8l/Harutoel_2012/Haruveida_2012.pdf

Frágreiðingin er 44 síður og fyllir 1.53 MB. Umfram veiðutøluni fyri 2012, ber eisini til at lesa um innannøring, um haruskjóting í Hesti, hvussu nógv ein føroysk hara vigar og um haruhundin Flykru, sum ein Hvannasundsmaður, ið býr í Leirvík, hevur fingið sær. Eisini verða nøkur søgulig tøl um haruveiðu endurgivin í frágreiðingini. Fleiri staðni hevur tað verið vanligt, at harumenn skriva niður, hvussu nógvar harur verða skotnar, antin á hvørjum túri, ella samlað fyri alla veiðitíðina. Tað hevur eydnast mær at fingið fatur á nøkrum av hesum søguligu veiðutølunum, og verða tey víst í frágreiðingini.

# NÓLSOYAR HARUTÍÐINDI



2013

